## Miðlar

Dagfinn Olsen
dagfinn.olsen@skulinfo



# Bólturin er rundur, jørðin líka so

So er Spania heimsmeistari í fótbólti. Kappingin er av. Og eftir stendur so spurningurin: hvat skal ein nú fáa mjørkatungu summarkvøldini at ganga við?

Nei, so galið er tað neyvan, men slík kapping í vikuvís fyllir nógv. Eg gjørdi tíðliga av, at hesaferð skuldi eg fylgja við og síggja so nógvar dystir sum gjørligt. Men mongum brestur ætlan. Oftast var okkurt annað á skránni, og eg sá nakrar dystir, men alt ov fáar til at kunna kalla meg serfrøðing í heimsmeistarakappingini 2010, ella til bara at kunna tosa við millum menn.

Jú, rættir menn tosa um fótbólt. Men havi nú lagt til merkis, at tað gera kvinnur eisini. Og tær vita væl. Eisini um annað, enn hársnið og privatlív hjá leikarum og um løtuna, tá teir skifta um troyggjur. Kvinnurnar eru eisini komnar við á vøllin í HM høpi.

Og so kann lýsingin um, at »der er sa meget kvinder ikke forstar« vera so góð sum hon vil. Tí hon er góð og stuttlig, í øllum førum, tá ein ikki er kvinna, men mannfólk. Og tað er ein góðtikin samfelagsregla, at tað eru mannfólk, ið vita mest um fótbólt, og tað tekur tíð hjá einum samfelag at broyta hugburð. Og hetta tykist ikki verða ávirkað av, hvussu veruleikin annars sær út.

Men síðstu mongu vikurnar hevur bólturin verið tað, ið heimurin hevur snúð seg um. Og ikki minst, tá sterki miðilin, sjónvarpið, sendir dystir og sjónvarpsstovuprát og metingar, gerst HM kappingin ein hending, sum í stóran mun setir dagsskránna.

Bólturin er rundur, jørðin líka so. Og verðin hevur snúð seg um fótbólt í vikuvís, men nú er hendan ringrás komin at enda og ringurin er heilur. Í Spania er fótbóltsveitsla. Umframt eitt sindur av kjaki um fløgg og tjóðskap.

Í Føroyum melur miðlamylnan enn mest um rundan ella flatan fisk. Um makrel. Runt og runt. Og hóast ringurin er heilur, so verður hildið á.

HM fepurin hevur lagt seg og føroyingar fara aftur í fisk. Agurkutíð er í miðlunum nú politikarar – teir við rundum orðaskvaldri, hava summarfrí. Augurkin er ikki rund, hon er long, og tað er agurkutíðin helst eisini hjá fleiri miðlafólkum. Og harvið eisini hjá lesarum og lurtaum. Men hinvegin er hetta sama gongd hvørt ár.

Runt og runt. Svá er lívið. Runt og runt.

Og áðrenn vit vita av hava vit verið so ofta runt, at tíð aftur er at hyggja at HM fótbólti. Og vit undrast, hvar tíðin fór, men gleðast um aftur at fylgja við HM kappingini.

*Í mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar.*



# MONT BLANC ER IKKI VANDAMIKIÐ

**KLINTRING - Tá tað verður fokuserað so nógv upp á tær mongu deyðsvanlukkurnar á Mont Blanc, so er tað ein yvirdramatisering, tí við rættari fyrireiking og ferðaleiðara er Mont Blanc líka trygd sum ein stórbýarferia, sigur Sjúrður Skaale, sum sjálvur níggjundi var uppi á tindinum á Mont Blanc fríggjadagin**

Leo Poulsen

Donsku bløðini vita í dag at siga um ein 64 ára gamlan dana, ið var dottin í deyðan á veg oman aftur av Mont Blanc. Men í hesum førinum eins og í øllum øðrum førum við deyðsvanlukku á høga fjallinum, eru tað vantandi fyrireikingar og vantandi trygdartiltøk, ið eru skuld í vanlukkunum.

- Vit eru allir familjumenn, og at taka nøkur óráð fyri hevði verið óhugsandi. Vit vandu okkum við hæddina í fimm dagar, har vit eisini saman við okkara ferðaleiðarum vandu okkum til tað, ið fór at koma seinasta teinin upp á Mont Blanc, sigur Sjúrður Skaale.

Hann sigur, at á veg oman aftur av tindinum møttu teir fleiri fólkum, sum einsamøll og uttan at vera íbundin klintraðu upp eftir fjallasíðunum.

- Slíkt er púra óforsvarligt, og tað hevði eingin av okkum funnið upp á at gjørt. Tað eru so nógvar sprungur í gletsjarunum, og missir tú fótafesti og dettur í eina slíka, berst ikki boð í bý, sigur Sjúrður Skaale.

Teir byrjaðu at klintra upp á 4810 metra høga tindin klokkan hálvgum tvey um náttina.

- Tá er kavin harðast og best er at ganga. Vit vóru íbundin fýra og fýra við einum ferðaleiðara í hvørjum fylgi. Stutt eftir at vit vóru farin avstað hoyrdu vit dunið frá einum lopi, sum var tætt við har, vit gingu, sigur Sjúrður Skaale.

### Yvirkomiligt

Tað er frá bygdini Chaminix at gingið verður upp á Mont Blanc frá fronsku síðuni av fjallinum. Har er alt lagt út eftir fjallinum, og skíð, klintran og trekking, sum tað verður rópt, hevur alt at siga fyri lítla samfelagið.

- At gerast ferðaleiðari har krevur eina longri útbúgving. Tú skal læra at kenna fjallið og týða ávaringartekin, eins og tú skal læra at fyrihalda teg til ta náttúru, sum er í fjallaøkinum, sigur Sjúrður Skaale.



Tað er í stóran mun sama toymi, sum í fjør var á Kilimanjaro, sum fríggjadagin klintraði upp á hægsta tindin á Mont Blanc. Men meðan tað er mest sum »a stroll in the Park« at ganga upp á hægsta fjallið í Afriku, so er tað heldur truplari at koma upp á Mont Blanc.

- Ikki fyri tað. Vit tosa um einar 15 tímar frá tí vit fóru frá húsum, til vit vóru niðri aftur í Chaminix, so tað er ein yvirkomiligur túrur, sigur Sjúrður Skaale.

Gingið var um einar fýra tindar og dalar, áðrenn ferðalagið var komið upp á tindin, men uppkomin var tað ein bergtakandi sjón at líta yvir allar fjallatindarnar í Alpunum.

- Nú eru menn so smátt byrjaðir at tosa um at klintra upp á hægsta fjall í Suðuramerika, Aconcagua í Argentina, sum er smáar 7.000 metrar høgt, sigur Sjúrður Skaale.

Ferðalagið fór úr Føroyum 3. juli og vóru aftur heima 12. juli.

leo@sosialurin.fo